# ri Báru-vinningurin



- Vit hava ongatíð mist vónina um bygdarhúsið, sigur formaðurin í bygdarfelagnum Báruni, Atli S. Justinussen

Mynd: Høgni Thomsen





*Bygdarhúsið í Árnafirði fer at kosta 8 mió krónur. Av hesum fer felagið sjálvt at útvega 2 mió.*

neyðugt við útbyggingum í framtíðini.

Roynt varð síðani at fáa eitt øki nærhendis tunnilsvegnum, og hetta eydnaðist so í august mánaði í fjør á hesum staði. Á sunnara armi á vegnum oman til bygdina liggur matrikul nr. 88b, og her er tað at bygdarhúsið skal liggja.

Tað er byggifrøðingurin Sverri Michalsen í Norðdepli, sum hevur teknað nýggja bygdarhúsið. Húsið verður í tveimum hæddum og fer at kosta um 8 mió krónur.

At fíggja byggingina fer felagið sjálvt at útvega 2 mió, meðan landið letur 2,2 mió og Klaksvíkar kommuna 2,2. Restin verður fíggjað við lánum.

**"Tað eru ikki øll tiltøkini hjá Báruni sum hava givið pening í kassan. Summi góvu undirskot, meðan onnur hava kastað væl av peningi til felagið**

## FAKTA

**Bygdarhúsið í Árnafirði**

Felagið "Báran" stovnað 4. desember í 1990
Hava arbeitt við at savna pening inn til bygdarhús síðani tá
Fingu byggiloyvi í august 2006
Leygardagin 17. februar 2007 kl. 16 verður spakin settur í
Útgrevsturin byrjar um mánaðarskiftið mars/apríl
Einki verður sagt um, nær bygdarhúsið skal takast í nýtslu
Kostnaðurin er mettur til 7-8 mió kr., harav felagið sjálvt útvegar 2 mió.
Bygdarhúsið skal kunna rúma eini 300 fólkum til ymiskt virksemi

*- Nú spakin verður settur í leygardagin er tað ein lætti fyri okkum, sigur Atli Justinussen.*

*Mynd: Høgni Thomsen*



## Tvey hús í bygdini – OK

Hóast tað fer at ganga nakað av tíð enn, til húsið sjálvt verður liðugt, hevur Atli longu gjørt sær sínar hugsanir um, hvat tað skal brúkast til.

- Her verður pláss til eini 300 fólk, so tað kann nýtast til mong ymisk endamál – bæði smærri og størri tiltøk, sigur hann.

Við so stórum húsi er møguleiki fyri at hava brúdleyp, fyrilestrar, skeið og annað virksemi. Hevur onkur hug at spæla sjónleik her, er tað ikki óhugsandi ella ógjørligt. Tað er, sum Atli tekur til, skjótt at seta ein pall upp.

Spurningurin er hinvegin, um ein so lítil bygd hevur tørv á – og ikki minst megnar at reka! – eitt slíkt bygdarhús. Á jólum varð nýtt Kapróðrarneyst tikið í nýtslu – og nú aftur eitt bygdarhús.

- Jú, sigur Atli. – Vit hava brúk fyri báðum. Og faktiskt verður tað til fyrimunar fyri allar partar!

Hann hugsar sær til møguleikan, at eitt størri tiltak er í bygdarhúsinum, samstundis sum eitthvørt tiltak er í Kapróðrarneystinum. Tá verða møguleikar fyri samstarvi millum húsini.

- Tá kunnu tey í bygdarhúsinum gera mat, bæði til sínar gestir og til tey sum eru í neystinum. Á henda hátt kann ein stuðla hvønn annan.

- Hetta verður nettupp til styrki fyri okkum øll, sigur hann avgjørdur.